

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 04 - 2012

# Nærkast semju um umstrídda oyggj

Í næstan 40 ár hava Kanada og Danmark keglast um ræðisrættin til ta lítlu oynna Hans Ø, sum er millum Kanada og Útnyrðingsgrønland, men nú bendir okkurt á, at londini nærkast einari semju. Kanadiska blaðið National Post veit at siga, at londini umhugsa eitt uppskot, sum stutt sagt sigur, at oyggin, sum er 1,3 ferkilometur og 100 metrar breið, verður býtt javnt millum londini bæði. Blaðið leggur dent á, at hvørki danskir ella kanadiskir myndugleikar hava góðkent uppskotið enn. -Kanada og Danmark samarbeiða fyri at finna eina skilagóða loysn, sum báðir partar kunnu góðtaka, sigur talsmaðurin hjá kanadiska uttanríkisráðnum, Joseph Lavoie, við National Post. Møgulig ráevni stóran týdning Hóast Hans Ø er lítil, oyðin og óbygd hevur hon stóran strategiskan týdning, soleiðis sum hon liggur landafrøðiliga millum Kanada og Grønland. Eitt er, at roknast kann við veksandi skipaferðslu fram við oynni í komandi árum, men spurningurin um rættindini til møgulig ráevni í undrgrundini so sum olju og gass vigar nógv í kjakinum, sum tók seg upp longu í 1973, tá markið millum Grønland og Kanada bleiv ásett. Síðani hava danir og kanadiumenn verið á oynni, eins og báðir partar hava ognað sær ræðisrættin yvir henni. Fyri sjey árum síðani samdust londini um at royna at loysa ósemjuna við samráðongarborðið, og hesi árini hava uttanríkisráðini í londunum báðum arbeitt við málinum. Danski uttanríkisráðharrin, Villy Søvndal, sigur í dag, at hann skal til Kanada í næstum at hitta starvsbróður sín har, John Baird, og at teir skulu tosa um Hans Ø.